**Býráðsfundur hósdagin 25. februar 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.15**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| **1.** | **13/00060**<br>**Val av nýggum limi sjálveigandi grunnin Báta – og listasavnið í Leirvík**<br>Í samband við at Bátasavnið og Málningasavnið var avhendað til Sjálvsognarstovnin "Báta- og Listasavnið í Leirvík" varð á býráðsfundi í Eysturkommunu samtykt viðtøkur fyri grunnin (telur 5 limir) og at umboð fyri kommununa í nevndini verða, Fríðgerð Heinesen, Erik Lervig og Páll Isholm. Umframt nevndu limirnar áseta viðtøkurnar, at stovnarar grunsins, sum eru Jórun og Osmund Jusitinussen, eru nevndarlimir so leingi teir ynskja tað.<br><br>Páll Isholm hevur í telduposti dagf. 04. februar 2013 boðað frá, at hann ynskir at verða loystur úr nevndarsessinum í nevndini fyri Bátasavnið.<br><br>Mentanarnevndin mælir til at Hanna Jensen verður limur í sjálveigandi grunninum "Báta – og listasavnið í Leirvík", nú Páll Isholm ynskir at verða loystur úr nevndarsessinum. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. |
| **2.** | **13/00065**<br>**Summarfrítiðin/summaransing á dagstovnunum**<br>Trivnaðarnevndin mælir til at stovnarnir eru stongdir í 2 vikur – 30 – 31.<br><br>Meirlutin í trivnaðarnevndini, Emma Rasmussen og Ólavur Olsen mæla til at gjald verður sett á summaransingina. Mælt verður til at gjaldið er 400 kr. um vikuna. Minnilutin Oluffa Joensen mælir til at einki gjald verður á summaransingini.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í trivnaðarnevndini. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen<br>Brandur Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Árni Jacobsen<br>Emma Rasmussen<br>Ólavur Olsen<br>Hanus Jacobsen<br><br>**Atkvøður ímóti:**<br>Oluffa Joensen<br>Hanna Jensen |

**Býráðsfundur hósdagin 25. februar 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.15**

Hanna Jensen og Oluffa Joensen høvdu tað viðmerking, at Eysturkommuna eigur at hava ansingartilboð í allari summarhálvuni, og eykagjald eigur ikki at verða tikið fyri sokallaðu "summaransingina" tí hon eigur at verða partur av tilboðnum.

**3. 13/00023**
**2.viðgerð av eykajáttan til konto 3.30.41.511-kloakkir (løgujáttan)**
Á seinasta býráðsfundi bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 550.000,00 í sambandi við arbeiðið at leggja kloakkir undir Gøtueiðið, og at asfaltera vegin Eiðisbrekka/Marknavegur.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**4. 13/00055**
**Umsókn um skattafrælsi**
Taks biðir um tilmæli frá býráðnum í sambandi við umsókn frá Ítrótta- og samkomuhøllini um skattafrælsi

Fíggjarnevndin mælir til at viðmæla at geva skattafrælsi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**5. 12/00075**
**Byggisamtykt og býarskipan fyri Eysturkommunu**
Eysturkommuna hevur í nøkur ár arbeitt við at gera nýggja byggisamtykt og býarskipan fyri allar bygdirnar. Sambært LL nr. 13 fra 21. mai 1954 um býarskipan og byggisamtyktir, sum seinnast er broytt við LL nr. 81 frá 25. mai 2009, hevur málið ligið frammi alment og eru nakrar viðmerkingar og ynski um broytingar komnar inn. ***(Saman við hesum málinum eru hesi mál tilknýtt, 12/00437, 13/00005, 13/00006, 13/00007, 13/00013 og 13/00016)***

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at góðtaka fyriliggjandi uppskot til býarskipan og

Oluffa Joennsen setti fram broytingaruppskot, um at tikið verður undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini við tí broyting at B2 øki við sambýlið í Norðragøtu verður broytt til at verða øki E (almennir stovnar).

Fyrst bleiv atkvøtt um broytingaruppskoti og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Oluffa Joensen
Emma Rasmussen

byggisamtykt við hesum viðmerkingum:

**Mál nr. 12/00437** verður mælt frá at ganga umsóknini á møti, og er hetta grunda á, at kommunan ikki hevur ætlan um at broyta økið omanfyri henda partin av bygdini og hevur bæði fyrr og nú arbeitt við at byggja bygdina inn í dalin. Áseting fyri økið í framtíðini verður H, sambært fyriliggjandi uppskoti fyri býarskipan og byggisamtykt.

**Mál nr. 13/00016** eru samd um at skipa fyri betri kunning til borgarar, feløg og onnur áhuga fyri økið Toftanes. Somuleiðis verður tikið atlit fyri at aðrir partar í kommununi eisini fáa somu viðgerð.

**Mál nr. 13/00005 og 13/00006** mæla til at øki C verður broytt at fevna um part av matr. nr. 33a og matr. nr. 86a og 88a verða framhaldandi áseting J.

**Mál nr. 13/00007** er áheitan um at fáa eina langtíðarætlan ið er ein partur av keypi av jørð og møguleiki fyri at dyrka nýggja jørð.

**Mál nr. 13/00013** mæla til at fylgja samtykt Gøtu bygdaráðsins.

**Atkvøður ímóti:**
Brandur Jacobsen
Hjalti Dalheim
Árni Jacobsen
Hanna Jensen

**Atkvøður blankt:**
Jóhan Christiansen
Hanus Joensen
Ólavur Olsen

Sostatt er broytingaruppskotið falli.

Síðani bleiv atkvøtt um upprunauppskoti hjá byggi- og býarskipanarnevndini, og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Brandur Jacobsen
Hjalti Dalheim
Árni Jacobsen
Hanna Jensen
Jóhan Christiansen
Hanus Joensen
Ólavur Olsen
Emma Rasmussen

**Atkvøður ímóti:**
Oluffa Joensen

Uppskotið hjá byggi- og býarskipanarnevndini er sostatt samtykt.

**6.** **13/00085**
**Navn til nýggja landsvegin gjøgnum Leirvíks bygd**
Navnanevndin mælir til at landsvegurin frá Brúsánni og út til sunnara tunnilsmunnan, skal eita Fjøruvegur.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum navnanevndini.

**7.** **13/00084**
**Uppskot til adressubroyting á Kulibakki 1 og 3**
Navnanevndin mælir til at Kulibakki 1 fær nýggja adressu, sum verður Garðsvegur 5.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum navnanevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 25. februar 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.15**

Kulibakki 3 verður óbroytt.

Navnanevndin mælir til at adressunavnið
Kulibakki á havnarøkinum verður óbroytt.
Navnanevndin mælir eisini til at varðveita
adressunumrini.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________